TING-HELLAN

# ferðtálmar

hetta, tá ið vit hugsa um ætlaninar at frælsi ítrótturin skal fara fram í hesum.

## Spurningur um innstilling

Í veruleikanum snýr málið seg um at stilla seg inn upp á, at ferðslan kemur eins væl fram við 30-40 km/t. sum við 50-70 km/t. Munurin er, at við lægri ferð verður tryggari, ikki minst hjá fólki, sum eru til gongu ella á súkklu. Fakta er, at er ferðin undir 30 km/t. tá ið tey verða árend av bili, so hava tey stóran møguleika at yvirliva. Men fer ferðin upp um 30 km/t. byrja møguleikarnir beinanvegin at minka. Tað ræður tí at stilla seg inn upp á, tað í summum førum fer at taka ein ella tveir minuttir longri at koma fram, og tað man fara at vera til at liva við. Argumentini, at smáar bungur ella gonguteigar, sum eru lyftir nakrar sentimetrar upp oyðileggja bilin halda ikki. Koyrir tú nóg spakuliga um ein ferðtálma, man neyvan henda skaði henda á bilin, hvørki so ella so.

## Nøkur positiv dømi

Tað eru eisini fleiri positiv ting hend, seinastu árini. Sum eitt gott dømi um gott ferðslutrygdarátøk kann verða nevndur niðari partur av R.C. Effersøesgøtu, har 3-400 m langa vegastrekkið fram við SMS er eitt



*Skraveraður strikurnar tvørtur um Havnargøtu sýna, hvar Jón Kragesteen hugsar sær ferðtálmandi vegbungurnar*

framúrskarandi fyridømi í Føroyum. Men spyrja vit, hvat skuldi til, áðrenn hetta varð gjørt, mugu vit ásanna, at svarini finna vit á kirkjugørðum. Í hesum sambandi kann Hoydalsvegurin eisini verða nevndur. Nógv fyri at so nógv skal til, nær man restin av R.C. Effersøesgøtu verða gjørd?

Onnur dømi um positiv ting eru allar rundkoyringarnar, sum eru gjørdar, Marknagilsvegurin fram við Handilsskúlanum og so ikki minst átakið við barnagarðar og skúlar, sum varð fyriskipað beint undan kommunuvalinum í heyst.

## Umsitingin hjá Býráðnum í Havn og ferðtálmar

Eg skal ikki leggja meg út í, hvussu borgarstjórin hevur handfarið júst aktuella málið. Men á ein hátt skilji eg hann. Tí mín fatan er, at umsitingin hjá býráðnum seinastu árini í nógvum førum hevur verið øgiliga sein at reagera, tá ið talan er um at fáa ferðtálmandi tiltøk framd. Tað sýnist sum um, at teir halda, at tá ið teir nú hava gjørt vegirnar so penar og fínar og ikki minst breiðar, kunnu vit ikki fara at "oyðileggja" teir við ferðtálmum. Annars nýtast ferðtálmar ikki partú at vera bungur, tað kunnu vera trongar, bogar o.s.fr.

Tað sýnist sum um, at tað at fólk kenna seg trygg, hevur minni at týða og fyrilitið til bilin og bilføraran, kemur langt fram um onnur, sum eru í ferðsluni. Tað er sum um, at tað er ikki gingið upp fyri teimum, at lívskvalitetur og trivnaður í einum bústaðarøki er grundað á tryggleika og ikki minst tryggleika í ferðslun.

Veit um fleiri dømi, har borgarar í grannaløgum, enntá samd eigarafeløg hava sett ynski fram um at fáa ferðtálmar. Men býráðið krevur eina seina og drúgva viðgerð, fyrst skulu ferðmátingar gerast o.s.fr. Og mangan kemur noktandi svar, t.d. soljóðandi: "Ferðslan er so lítil í umráðnum, og tí er grundarlag er ikki fyri ferðtálmum" - ella: "ferðslan er so nógv, at tað ber ikki til at gera ferðtálmar". Hvør ið so hevur gjørt av, at júst hesi kritierii skulu vera galdandi, veit eg ikki. Her er í hvussu er ein umráðandi spurningur, sum eigur at verða tikin upp.

Í mínari verð hevur kriteriið, at fólk kenna seg trygg og tora at lata børnini út at spæla, størsta týdningin. Bilarnir skulu nokk koma fram allíkavæl.

Annars vildi eg trúð, at hesin bráði framferðarhátturin hjá borgarstjóranum, verður ikki tann vanligi fram yvir. Tí sjálvsagt er neyðugt at grunda avgerðirnar á faklig tilmæli og at arbeiða við yvirskipaðum ætlanum.

## At enda

Tað er ikki bara í høvuðsstaðnum, at hetta fyribrigdið, at bilurin hevur størst týdning, er galdandi. Hyggja vit í bakspeglið mugu vit ásanna, at vit kring alt landið hava bygdir og býir, har byggingin í stóran mun bara hevur lagað seg eftir tí, sum situr aftan fyri róðrið - handan stál og airbag.

Vit hava tí eitt samfelag, sum meira og meira leggur upp til at fólk skulu ikki flyta seg. Børn verða koyrd í skúla, til ítrótt og onnur tiltøk, tí at foreldur tora ikki annað. At ganga er eitt, men at súkkla er enn verri.

Spurningurin er so, um tað er hetta vit vilja? Vilja vit hava eitt samfelag, sum skal vera so keðiligt at vera í, at tað einans ber til at ferðast í tí við bili? Eitt er so ferðslutrygdin, men hvussu verður við heilsuni í einum samfelag, sum minni og minni leggur upp til at vit røra okkum?

# Avreiðingin av silvurinum

TINGHELLUKLUMMAN

*Gordon Ejdesgaard*



Kjakið um einskiljing/**avreiðing** av ognum okkara er kanska komið í gongd. Frálíkt at bæði skrivandi sum loftmiðlar taka hesið viðurskiftið upp.

Nú skrivið eg ikki bert fyri at rósa miðlunum, men tá eitt gott arbeiði er á veg, skulu teir hava eitt herðaklapp.

Well. Og hvat so. Jú, vit eru við at avdúka eitt sjálvbedrag/heilaspuna sum sigur spaðar 2 til alt sum ein trúi var lygn. Biðið lesaran orsaka at eg eri nakað bersøgin. Eg skal grundgeva stutt fyri, hví eg haldi, at so er. Sum F.M. Dolstojevskij sigur í " En Grønskolling" á blaðsíðu 11: "nú til sakina, hóast hetta væl er tað truplasta yvirhøvur." (mín leysliga týðing).

Jú, hví hetta tosið um einskiljing. Einsvæl og vit tóku ein rutchutúr í 90-unum, eru vit væl á veg. Hvør er grundgevinging fyri einskiljingum? Skuldi tað veri at skipa vinnuna frægari við at selja? Men tað eru jú somu fólk, sum nú bert sita í eini aðrari *juridiskari konstruktión* enn verandi. Uppgávan er tann sama. At avreiða okkara tilfeingið er als eingin grundgeving bert fyri at fáa eina fíggjarlóg í balansu (pening til Bárð). Bert fyri at gjalda skuld. Hetta mál kann saktans loysast øðrvísi.

Og so til sakina: Hvat um Atlantsflog til dømis fer rabundus sum privat virki? So eru vit "på Herrens mark".Vit tosa jú um eitt monopol. Hvør skal nú gjalda? Vit skulu hóast alt flúgva. Men her verður skattgjaldarin við sviði soð. Rokningin kann bert enda á einum stað. Hjá okkum skattaborgarum- landskassanum. Hetta er logikkur fyri flestu búrhøsn. Tað er púrt óneyðugt at vera búskaparfrøðingur fyri at avdúka bluffnummarið. Sunn fornuft og bein á jørðini er saktans nokk.

## Rentabilitetur eigur ikki at verða seldur

Veruliga uppgávan er at stilla krøv til leiðslurnar um búskaparligt avkast og sunnan rakstur. Og góðan starvsfólkapolitikk. Tað er jú púrt óneyðugt at einskilja. Vit hava nýtt generatiónir at byggja hesi virki. At avreiða hetta orsakað av pop-"økonomum" (mainstream hugsanin) er synd.Teir reka við rákinum. **Teir** kunnu avreiðast- ikki allar ognir samfelagsins.

Øll grundgeving fyri einskiljingunum minnir um lemmingarnir sum um ein háls fóru av leið. Eg vil siga villeiðing. Kanska einskiljing?

T.d. verður Føroya Banki neyvan betri av at verða seldur-Janus er Janus. Gott avrik, men vit rokna væl ikki við at tað verður stórvegis øðrvísi bert tí vit broyta eina juridiska konstruktión.

Spurningurin er einfaldur: er talan ikki bert um bókhaldaríaltso einskiljing. Men Janus og Magni verða væl hóast alt stjórar, ella skulu teir kanska hava sekkin? Tað gevur onga meining.

Mín niðurstøða er greið: potitikkarir ansið eftir ikki at selja silvur okkara bert fyri at selja. Talan er um eitt marknaðarført fuppnummar. Tykkara/okkara børn fáa rokningina tá virkini fara.

## Einki er galið við almennum partafeløgum

Enn einaferð- loysunarorð míni eru búskaparligt hovsemi og umhugsni. Vælsignaði løgtingsmenn og -kvinnur gjaldi um tit hava hug, bert ikki sendi rokninga til børn okkara.

Og skulu vit tosa um gjøgnumskygni? Hvat við einskiljing og gjøgnumskygni.

Nakað eg ikki enn havi sæð til enn. Ein partur av fuppnummarinum? Segið nakar keisarin? Vaknið for Guðsskyld. At selja okkara ognir er løtuvinningur.

Seljið um nakað so tað sum gevur hall. T.d Strandferðsuna. Ikki hønuna við gulleggunum (t.d.Tele og Atlantic)

Vir prudens non contra ventum mingit.

Ella á føroyskum: at "lata landið" móti lotinum gera klókir menn ikki.

Hall landkassans kann t.d. fíggjast við at avtaka skattafrádráttin - hetta bert sum eitt av mongum uppskotum.

Ella við skjótari lógarbroyting kann landskassin fáa umleið ein hálva milliard av tryggingar íløgunum, sum annars eru placeraðar í t.d. Danmark.

Hetta er jú bert spurningur um teknikk, "kreativan hugsunarhátt" -ella nýhugsan.